# Talentið í Valby

**17 ára gamli Gunnar Nielsen hevur sáttmála við danska felagið Frem, men eisini enska stórfelagið Liverpool hevur sýnt honum áhuga. Málverjin ætlar koma so langt sum gjørligt innan fótbóltin uttanlands**

**Eyðun Klakstein**
*eydun@sosialurin.fo*



*– Málið hjá mær er at koma so langt sum gjørligt innan fótbóltin. Eg ætli mær ikki heimaftur til Føroya fyribils, men hinvegin farið at vita, hvussu langt eg kann koma uttanlands, sigur Gunnar Nielsen*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

**Valby:** Teir ganga forbí. Spælarar hjá fótbóltsfelagnum Frem. Besta liðið, sum roynir seg í superliguni, hevur verið úti og vant, og nú koma teir aftur í felagshúsið. Ein fyri og annar eftir koma teir inn í gongina, lata seg úr gaggunum og fara niður trappurnar, har skiftirúmini eru.

So stendur hann har. Jú, hann er stórur. Nakrar sentimetrar omanfyri teir 190, klænur og væl bjálvaður í klæðum til venjingina úti í kuldanum og sirminum.

17 ára gamli Gunnar Nielsen er størsta málmanstalentið í føroyskum fótbólti í løtuni. Sáttmálabundin í danska felagnum Frem, men við eygunum festum á eini framtíð sum yrkisspælari – gjarna í einum størri felag enn tí í Valby.

Hann hevur spælt á fleiri ungdómslandsliðum hjá Føroyum, og fyrr í ár var hann eisini inni í hitanum á A-landsliðnum, tá ið hann varð kallaður inn sum avloysari fyri vanligu málverjarnar, sum ikki kundu verða við á venjingarleguni í Spania.

Men hann tekur tað róligt. Veit, at hann skal venja nógv komandi árini og menna seg enn meira sum málverji, áðrenn hann kann heysta fruktirnar av tí eyðsýnta talentinum, sum hann hevur.

## Av landinum um tú vilt nakað

Gunnar Nielsen hevði sín fótbóltsliga uppvøkstur í HB, men tá ið hann skuldi í 10. flokk, leitaði hann sær av landinum. Leiðin gekk til Hesselgods fótbóltsskúlan í Grenå, har skúlagongd og fótbóltvenjing á høgum stigi verða tvinnað saman.

– Eg vildi sleppa til Hesselgods fyri at fáa meira og kanska betri venjing. Um tú vilt nakað við fótbóltinum, so noyðist tú uttanlands, og ert tú ov gamal, áðrenn tú fert avstað, so kann tað gerast sera trupult, sigur Gunnar Nielsen.

Hóast hann er blaðungur, so tosar hann umhugsin og avgjørdur, og tað hoyrist, at tað liggur nakað aftanfyri orðini hjá honum. Hann vil nakað.

Tá ið skúla- og fótbóltsárið hjá Gunnari á Hesselgods skúlaum var liðugt, fingu hann og tveir aðrir føroyskir spælarar møguleikan í danska felagnum Frem, har teir mangladu styrk til unglingaliðið hjá sær, sum ikki hevði staðið seg so væl.

Gunnar Nielsen, Jónas Næss og Bogi Hermansen gjørdu góðan mun í Frem, tí unglingaliðið vann eina rúgvu av dystum, eftir at teir vóru komnir á liðið.

Hetta hevði við sær, at Gunnar og Jónas gjørdu ein tvey ára sáttmála við Frem, og umframt fótbóltin hevur Gunnar eisini handilsskúla at passa í Ishøj, har hann býr.

## Kendir menn leggja lag á

Líka síðani hann spældi við smápiltum, hevur Gunnar Nielsen verið málverji.

– Mær dámdi altíð væl at standa í málinum. Eg var stórur av vøkstri, og tað hevði kanska eisini við sær, at eg var settur í málið, greiðir Gunnar frá.

Kanska hevur tilvildin havt ein týðandi leiklut í, at Gunnar gjørdist málverji, men nú verður einki longur latið til tilvildina at ráða yvir.

Hann venur fýra ferðir um vikuna við unglingaliðnum, har hann eisini spælir dystir. Harafturat er hann eisini við í venjingini hjá superligaliðnum minst tvær ferðir um vikuna, og har er tað kendur og royndur danskur málverji, sum stendur fyri málmansvenjingini.

– Eg fái nógv burtur úr hesi venjingini. Peter Kjær er málmansvenjari, og so er fyrrverandi Liverpool-málverjin, Jørgen Nielsen, málmaður hjá superligaliðnum.

Hetta er góðir menn at leggja unga føroyska málverjanum lag á, og Gunnar fjalir ikki út yvir, at í Frem fær hann betri venjing, enn hann kundi fingið í Føroyum.

## Liverpool sýnt áhuga

Tíðliga í ár var Gunnar Nielsen til venjing í mæta enska felagnum Liverpool í eina viku. Tað var venjari hansara á unglingaliðnum í Frem, sum hevði vakt áhugan fyri Gunnari í Liverpool, tá ið hann var á eini inspiratiónsferð í Liverpool.

– Tað gekk væl í Liverpool. Eg havi ikki vant, meðan eg hevði verið í jólafrí í Føroyum, og eg fór beinleiðis úr Føroyum til Liverpool. Hóast hetta so lótu teir væl at mær, og teir søgdu, at teir ætla at fylgja mær komandi tíðina, sigur Gunnar Nielsen.

Liverpool kemur at mangla ein málmann í hansara aldri í summar, so hvør veit, um tað aftur verða boð eftir Gunnari tá.

– Eg ætli mær ikki at leypa fram av, fyri tað um eg havi verið í Liverpool og vant. Tað hevði sjálvandi verið fantastiskt at sloppið har at spælt og ment meg sum málmann. Tað ber eisini til at siga, at Liverpool kanska er eitt ov stórt felag til mín í løtuni, men fekk eg møguleikan í Liverpool, so tók eg av.

– Málið hjá mær er at koma so langt sum gjørligt innan fótbóltin. Eg ætli mær ikki heimaftur til Føroya fyribils, men hinvegin farið at vita, hvussu langt eg kann koma uttanlands, sigur Gunnar Nielsen.

### *Tríggir í Frem*

Tað eru tríggir ungir føroyskir spælarar í danska felagnum Frem. Allir venja og spæla við unglingaliðnum í felagnum, sum spælir í bestu donsku unglingadeildini.

Gunnar Nielsen er málverji hjá liðnum, og Jónas Næss spælir á sentrala miðvøllinum. Teir báðir hava sáttmála við Frem.

Harafturat er eisini Bogi Hermansen í Frem. Hann byrjaði samstundis sum hinir báðir, men fór so heim til Føroya eitt skifti. Í heyst kom aftur til Danmark og spælir nú aftur í felagnum.

Gunnar hevur spælt ungdómsfótbólt í HB, Bogi í B36, og Jónas hevur fyri tað mesta spælt í B36, men tó eitt stutt skifti í HB, áðrenn hann fór til Danmarkar.












